MARITIME SURVIVAL TRAINING CENTRE



HJARTASTOYTARASKEIÐ GRUNDLEGGJANDI ELDSLØKKING

TRYGDARSKEIÐ FYRSTUHJÁLPARASKEIÐ SLV-SKEIÐ





Trygdarmiðstøðin – er stovnur undir Fiskimálaráðnum ið hevur trygd á sjónum sum eitt av sínum málsøkjum. Trygdarmiðstøðin varð stovna í 1999 sum sjálvstøðugur stovnur, til at geva sjómonnum skeið í trygd á sjónum smb løgtingslóg nr. 63 frá 3. juli 1998 um manning av skipum. Trygdarskeiðini ganga undir ásetingarnar í STCW 95 sáttmálanum, og eru í dag viðurkend av IMO.

Trygdarmiðstøðin
www.seasafe.fo

Bøgøta 38
Postboks 297
700 Klaksvík
Tel. 45 58 82
Fax 45 71 97

MIÐSTØÐIN

Miðstøðin veitir
føroysku fiskivinnuni
tænastu innan kassar og kør





Miðstøðin P/F Toftagjógv 5 FO-650 Toftir Føroyar
Tel. +298 44 99 50 Faks. +298 44 99 53 t-postur: post@kassi.fo

www.kassi.fo

# Súlan komin aftur til Toftir

## Motorbáturin, sum var heimahoyrandi á Toftum árini 1944-1966, er keyptur aftur til bygdar og skal gerast ein livandi partur av skipasøguni í kommununi

**Vilmund Jacobsen**

Hin 19. januar í 2011 var fundur í Tofta skúla um stovnan av einum áhugafelag, sum skal samla skipasøguna í kommununi. Eisini skuldi áhugafelagið gera eina roynd at keypa motorbátin Súluna, sum var heimahoyrandi á Toftum í nógv ár.

### Søguligt virði

Tað var P/F D.P. Højgaard, sum keypti bátin til Toftir, og var báturin nógv ár í reiðarínum. Seinni varð hann seldur til feðgunum, Aksel og Gunnar Olsen á Toftum.

Báturin, sum kallaðist Nípan tey 22 árini, hann var á Toftum, hevur sostatt søguligt virði fyri bygdirnar og fólkið, sum her býr.

Nú hevur áhugafelagið, sum varð stovnað í januar í ár, so keypt motorbátin, sum seinastu árini hevur verið heimahoyrandi á Signabø.

### Livandi umboðan

Ætlanin er at seta motorbátin í uppruna stand, so hann eisini kann sigla við seglum og gerast ein livandi umboðan fyri okkum sum her búgva, eins og fyri skipasøguna her á staðnum.

Á fundinum hin 19. januar var stórur áhugi fyri ætlanini. Áhugafelag varð stovnað, og blivu hesir valdir í nevndina: Haldor Gaardbo, Johan Johannesen, Jógvan Harryson, Jørgin Gleðisheygg, Símin Johannesen.

55 fólk teknaðu seg eisini sum lim á fundinum.

Áhugafelagið fer nú at senda skriv í hvørt hús í kommununi, so fleiri hava høvið at tekna seg sum lim í felagnum.

**» Nú hevur áhugafelagið, sum varð stovnað í januar í ár, keypt motorbátin Súluna, sum seinastu árini hevur verið heimahoyrandi á Signabø**



*Ætlanin er at seta motorbátin í uppruna stand, so hann eisini kann sigla við seglum og gerast ein livandi umboðan fyri okkum sum her búgva, eins og fyri skipasøguna her á staðnum.*

*vilmund@sosialurin.fo*